# Turkiski venjarin gevst

Við 2-0 tapinum móti Belgia er greitt, at Turkaland ikki kemur við til HM-endaspælið komandi summar, og sunnudagin tók venjarin, Fatih Terim avleiðingarnar av hesum. Terim hevur annars sáttmála fram til 2012, men sjálvur sigur hann, at tað er best, um onkur annar nú tekur yvir. – Dysturin móti Armenia mikukvøldið verður mín seinasti sum landsliðsvenjari, sigur Terim, sum fyrr hevur vant Fiorentina, AC Milan og Galatasary.



# Capello tapti

Fyri fyrstu ferð, síðani Fabio Capello tók við sum landlsiðsvenjari, tapti Ongland ein fótbóltslandsdyst. Hetta hendi á útivølli móti Ukraina í einum dysti, har málverjin, Robert Green, varð rikin av vøllinum eftir einum korteri. Andrey Shevchenko brendi misnýtti brotssparkið, sum spurdist burturúr hesum, men eftir hálvum tíma skoraði Serhiy Nazarenko einasta málið, sum kom í dystinum. Ongland hevur tó langt síðani tryggjað sær atgongd til HM-endaspælið.



Føroyska U21-landsliðið, sum spældi í Moskva, var mannað soleiðis: 1 Hans Jørgensen, 3 Rógvi Holm, 5 P.J. Justinussen, 6 Jóhan Ellingsgaard, 7 Rógvi Poulsen (Páll Klettskarð 89.), 8 Róaldur Jacobsen (Steinarr Kamban 70.), 9 Finnur Justinussen (Øssur Dalbúð 52.), 10 Christian R. Mouritsen, 11 Kristoffur Jacobsen, 13 Heri Nesá, 14 J.S. Edmundson

# Taptu 2-0 móti Russlandi

**Føroyska U21-landsliðið var væl við í dystnum móti Russlandi, men tað eydnaðist ikki at skapa enn eina sensatión**



Jákup Mørk

Russka bjørnan lat seg ikki lumpa fleiri ferðir á rað. Leygardagin á døgurða spældi føroyska U21-landsliðið móti Russlandi, sum skuldi hevna eyðmýkingina í Gundadali fyrr í ár, og partvíst eydnaðist hetta. Men tað hendi ikki við stórsigrinum, sum russar uttan iva høvdu ætlað sær.

Russar komu á odda í fyrra hálvleiki, men hóast teir trýstu nógv, so eydnaðist teimum ikki at taka spenningin úr dystinum. Tvørtur ímóti høvdu okkara menn eisini sínar møguleikar, og við eitt lítið sindur av hepni kundu føroyingarnir eisini havt javnað.

Luftin fór tó úr okkara spælarum at enda, og tá russar í yvirtíðini skoraðu sítt næsta mál, var fagnaðurin hjá heimamonnunum ovurstórur.

# Bill harmaðist seinna málið

**U-21 landsliðsvenjarin er kortini nøgdur við leikliga avrikið hjá sínum monnum**



Heri Simonsen

- Skuffandi úrslit. Tað var 1-0 líka til dystarenda. Tað síðsta, sum hendi í dystinum var, at teir skoraðu, so tað er eitt sindur deprimerandi, sigur Bill McLeod Jacobsen, venjari hjá U-21 landsliðnum úr Moskva.

Fyrra málið kom eftir 20 minuttirs spæl, tá Hans Jørgensen vippaði bóltin upp á yvirleggjaran, men har føroyska verjan var ov sein til at fylgja upp.

- Vit spældu fínan fótbólt. Smáspælið hjá okkum á miðjuni riggaði væl, og verjan stóð sterk. Finnur Justinussen var í álopinum, stuðlaður av Christian R. Mouritsen. Seinni bleiv Jóan Símun Edmundson fluttur fram í álopið, og tá bleiv Finnur Justinussen fluttur út á veingin. Vit høvdu 5-6 rættiliga stórar málmøguleikar, har Steinarr Kamban hevði tann størsta ímóti dystarenda. Hann fekk innaru síðuna á bóltin, men tíverri fór royndin beint á russiska málverjan, greiðir Bill McLeod Jacobsen frá.

Bill heldur, at debutanturin, Steinarr Kamban gjørdi tað gott í dag. Bill heldur, at ein eitt-málssigur til Russland hevði verið eitt rættvíst úrslit, tí yvir allan dystin var Russland betri enn Føroyar, men hann staðfestir, at 1-0 hevði sæð væl betri út enn 2-0. Men 2-0 ímóti einum sterkum russiskum liði á útivølli er á einari leið.

- Men leikliga eri eg nøgdur, vit spældu ein fínan dyst, undirstrikar Bill McLeod Jacobsen.

Leikliga avrikið gevur eisini vónir um eitt líkinda úrslit ímóti Rumenia í komandi viku. - Vit spæla longu týsdagin aftur, og tað kann kosta í kreftum, serliga á miðjuni, segði Bill McLeod Jacobsen úr Moskva.



**Bill McLeod Jacobsen var væl nøgdur um føroyska avrikið, hóast seinna russiska málið ikki akkurát pyntaði um úrslitið**

# Stóri Rógvi var ov stuttur

**- Eg var akkurát ov stuttur, men við eini tíggju sentimetrum aftrat, so hevði eg kanska fingið tonna á bóltin, sigur Rógvi Jacobsen um støðuna beint áðrenn franskmenn økja til 2-0 og avgera dystin**



Rólant Waag Dam

Tréguier, Frankaríki: Hann telist millum okkara stóru, men leygarkvøldið var hann ov lítil. Í tveimum førum tveitti Rógvi Jacobsen seg fram eftir einum frísparksinnleggi frá Súna Olsen, men í báðum førum var vælvaksni klaksvíkingurin akkurát ov stuttur.

Serliga fyrra støðan var harmilig, tí beint aftaná fara franskmenn í kontraálop, skora og avgera í roynd og veru dystin. – Men áðrenn tað koma teir ikki spælandi til heilt stórar kjansir. Teir hava okkurt úti frá, sum rakar yvirleggjaran, men annars standa vit okey á vøllinum. Men so haldi eg gott tú kanst siga, at trý tey fyrstu málini vóru gávur frá okkara síðu, og so renna vit aftan á restina av dystinum, metir Rógvi Jacobsen, sum var aftur á føroyska landsliðnum eftir fráveru í meiri enn eitt ár vegna skaða.

## Bilsin um at byrja

Tískil var hann eisini bilsin um at byrja inni móti Frankaríki.

– Eg vónaði at fáa ein hálvleik, men hevði ikki roknað við at byrja inni, so tað eri eg bara fegin um, sigur Rógvi Jacobsen, sum tó harmast gongdina í dystinum.

– Tað gjørdist øgiliga tungt. Eg haldi tað er tí, at vit bakka so nógv fyri ikki at opna fyri teimum, men av tí sama eru vit ikki nóg aggresivir á bóltinum, tá teir hava hann og tí verða vit pressaðir aftur, greiðir Rógvi Jacobsen frá, sum er alt annað enn nøgdir við avrikið leygardagin.

– Tá tú tapir 5-0, so sigur tað seg sjálvt, at tað er okkurt, sum ikki riggaði sum tað skuldi, sigur hann.

Av tí sama er eisini nokk at arbeiða við, metir Rógvi Jacobsen. – Nú skulu vit hava gott mót og reisa okkum aftur áðrenn vetrarsteðgin. Fyrst og fremst ræður um at hyggja eftir, hvat fekk galið leygardagin. Trý tey fyrstu málini er nakað, vit ikki fáa ruddað burtur. Eru vit tættari í teimum og blokera skjótari, so kunnu vit fyribyrgja nokk so nógvum, sigur Rógvi Jacobsen, áðrenn hann leggur aftrat.

– Men har er eisini nógv, vit skulu rætta upp á.